# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 2. mars 2010




Ársins spælari í fjør verður uttan iva toppskjútti í føroysku kappingini í ár. Og longu nú er greitt, at Adina Petrea eisini verður at síggja hjá Tjaldri, tá farið verður undir nýtt kappingarár í heyst

## Profilar hjá Tjaldri halda fram

**Tjaldur skrivar á heimasíðu sínari, at nýggir sáttmálar eru skrivaðir við Adinu Petrea og Cornelia Rimbu**




Jákup Mørk

Tær báðar høvdu síni avgerandi orð at siga, tá Tjaldur í fjør vann sítt fyrsta FM-heiti í kvinnuhondbólti. Ikki minst var tilgongdin av Adinu sera týðandi, og fult uppiborið vann hon eisini heiðurin sum ársins spælari í føroyskum kvinnuhondbólti.

Cornelia Rimbu kom til felagið í fjør heyst, eftir at kappingin var byrjað, og hon hevur eisini styrkt sera væl um hópin.

Undan vikuskiftinum longdi Tjaldur sáttmálan við Bogdan Burcea, sum er venjari hjá kvinnunum, og við at leingja sáttmálarnar hjá tveimum av heilt stóru profilunum hevur Tjaldur undirstrikað, at tey eisini vilja spæla ein leiklut í føroyska hondbóltsoddinum komandi kappingarár.

**Hondbóltur**

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 16 | 14 | - | 1 | - | 1 | 468 | 320 | 148 | 29 |
| 2 Tjaldur | 17 | 14 | - | 1 | - | 2 | 499 | 382 | 117 | 29 |
| 3 Neistin | 16 | 9 | - | 0 | - | 7 | 421 | 391 | 30 | 18 |
| 4 VÍF | 16 | 5 | - | 0 | - | 11 | 386 | 447 | -61 | 10 |
| 5 StÍF | 16 | 4 | - | 0 | - | 12 | 379 | 477 | -98 | 8 |
| 6 VB | 17 | 2 | - | 0 | - | 15 | 361 | 497 | -136 | 4 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 16 | 13 | - | 0 | - | 3 | 519 | 423 | 96 | 26 |
| 2 KÍF | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 412 | 433 | -21 | 15 |
| 3 Kyndil | 16 | 7 | - | 1 | - | 8 | 383 | 432 | -49 | 15 |
| 4 VÍF | 16 | 7 | - | 0 | - | 9 | 470 | 460 | 10 | 14 |
| 5 H71 | 16 | 5 | - | 3 | - | 8 | 429 | 442 | -13 | 13 |
| 6 StÍF | 16 | 6 | - | 1 | - | 9 | 418 | 441 | -23 | 13 |

## Neistin skal staðfesta bronsuna

**Klokkan 18.30 í kvøld spæla kvinnuliðini hjá Neistanum og VÍF**




Jákup Mørk

Við sigrinum á StÍF sunnudagin staðfesti VÍF, at tær ikki ætla sær nakran sum helst veg niður úr Sunset-deildini, tá hetta kappingarárið er av.

Seinastu nógvu umførini hevur VÍF eisini givið ábendingar um stóra potentialið, sum býr í liðnum, og á heimavølli móti Neistanum bragdaði eisini hjá teimum, tá tær heldur óvæntað vunnu tvey sera týðandi stig.

Tann dysturin er avgjørt nakað, sum Neistakvinnurnar vilja hevna.

Tað er eingin ivi um, at Neistin stendur við bronsumerkjunum, tá kappingin er av, men dysturin móti VÍF er samstundis eitt høvi at prógva, at Neistin uttan nakran sum helst iv hevur uppiborið bronsumerkini. Og ivaleyst er tað hetta, sum tær bláu ætla sær at prógva í dystinum.

## Elspa gjørdi bart

**Elspa Mørkøre, sum nú hevur tikið sess við árarnar, var sterkasta kvinnan av øllum, tá Havnar Róðrarfelag skipaði fyri kapping í inniróðri**

Kappast varð í Eysturskúlanum í Havn, og hóast kappingin eitt skifti var í vanda vegna ov lítla undirtøku, so sótu kortini heilt nógv fólk við maskinurnar leygardagin.

Og hesi kundu staðfesta, at tað vóru tvey spildurnýggj andlit, sum vunnu seg á tindarnar í teimum báðum sterkastu bólkunum.

Í opna bólkinum hjá monnum var tað bara 16 ára gamli Sverri Sandberg Nielsen úr Miðvági, ið endaði fremstur. Og tað væl og virðiliga eisini, tí munurin aftur til næsta rógvaran var ikki minni enn 13 sekund.

Hjá kvinnunum var fyrrverandi elitusvimjarin, Elspa Mørkøre, stinnasti rógvarin. Hon hevur nú tikið ein steðg frá svimjingini, men fáur man ivast í, at venjingarstøðan framvegis er betur, enn hon er hjá teimum flestu, tó at hon fekk harða kapping frá Ránnvá Lava Olsen úr kappróðrarfelagnum NSÍ.

-mørk